


| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Fisher | Lassaberg | Schwartz | Dam |
| pass | pass | 2♥ 1) | D |
| pass | pass | | |

1) Veikur við báðum major.

Útspæl: ♦K

Vanliga kontraktin í hesum spælinum er 3ut NS, sum fer niður, tí kortini sita illa. Í rúminum, har Dánjal Pauli Mohr og Arne Mikkelsen sótu EV, komu teir í mótspæl móti 3ut, sum teir settu eina ferð og fingu soleiðis 100 inn.

Við borðið hjá Símini Lassaberg og Árna Dam royndi ísraelsmaðurin í Eystri, Ron Schwartz, í triðjuhond at “leggja fót” fyri føroyingunum við einum 2♥ meldi, ið vísti báðar majorlitirnar.  Árni dupladi við Suðurhondini, sum eftir avtalunum hjá teimum báðum vísti áhuga fyri at spæla ímóti. Um Árni vildi víst báðar minorlitirnar, hevði hann meldað 2♠, og so hevði hann eisini møguleikan at  melda 2ut fyri at vísa 15-17. Símin tók av og meldaði pass til 2♥D, hóast mótparturin var uttan fyri hættu, og NS í hættu, sum ger tað freistandi at fara í 3ut hjá NS.

Árni byrjaði mótspælið við ♦K og tók síðan ♥K og ♥Q og spældi hjartara til essið hjá Símini. Símin, sum hevði markerað doubleton í rútara, spældi rútara til essið hjá makkaranum og fekk síðan eina rútaratrumfing. Lágur spaðari varð spældur til ♠9 og ♠A. Mótspælið fekk harafturat tvey kleyvarstikk og eitt spaðarastikk. Fýra dupladir niður kostaðu 800, sum afturat teimum 100 frá hinum borðinum gávu føroyska liðnum 14 imp.